

## Tvíhús til sølu á Heygsvegnum 16 Tórshavn

Talan er um eini nýgg tvíhús har alt er gjørt bæði innan og uttan.

Húsini eru í tveimum hæddum, á veghæddini eru 3 kømur, baðiverilsi, bryggers og gongd, á 1. hædd er stova og køkur við atgongd til altan, kamar við atgongd til altan og baðirúm.

Húsini liggja væl fyri, 10.min oman í býin, sera góðan sólargang og gott útsýnið.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst, minsta boð er 2.450.000 kr.

**VALBJØRN DALSGARÐ**
RYGSGØTA 20 FO-160 ARGIR
TLF 319279 MOBIL 512118 FAX 312118
MAIL VALBJORN@VALBJORN.FO
WWW.VALBJORN.FO

## Til leigu

Handilshølir & skrivstovuhølir til leigu frá 1. sept. 2008. Handilshøli á uml. 110 m². Skrivstovuhøli frá 50 m² – 600 m², eftir ynski.

**Tlf. 505900**

KIOSK ACTIV

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir krambafólkið til at arbeiða náttarvaktir í vikuskiftinum og vanligar kvøldvaktir í Kiosk Activ, J. Broncksgøtu at byrja skjótast gjørligt.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**

## Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. januar 2009 til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo



## Hús á Strondum

Vegna ein av klientum okkara verður sethúsa-ognin matr. 590 á Strondum hervið lýst til sølu um nóg høgt boð fæst.

Talan er um eini eldri sethús, við tilhoyrandi hoyggihúsið/seyðahús og drívhús. Urtagarður er rundan um húsini. Húsini hava stóra altan suðureftir. Eisini er eitt innhegnað jarðastykkið, ið hoyrir til húsini. Samlaða grunddøki er umleið 2000 m².

**Húsini eru í 3. hæddum:**

**Ovasta hædd,** baðirúm, 5 kømur og goymslu-rúm.

**Miðhædd,** durur, w.c., køkur, 2 stovur, ein útistova, hjúnarúm, kamar og trappa niður til skrivstovu.

**Niðasta hædd,** skrivstova, kjallararúm/fyr-rúm/vaskirúm, 3 goymslurúm, durur.

Ognin liggur væl fyri í gamla økinum í bygdini, við lítlari ferðslu og góðum útsýni.

Áhugaði kunnu venda sær til Advokatvirkið, Eyðhild Skaalum, adv. ella Lydiu Thomsen, skr.

**Advokatvirkið**
Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • jus@olivant.fo
www.advokatvirkid.fo

Sosialurin -har tað hendir




## Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløgu-spælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Starv á Fróðskaparsetri Føroya
Endurlýsing

## Lektari/adjunktur í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini. Um so er at eingin við lektaraførleika søkir, kann starvið verða sett sum adjunktstarv.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í stjórnmálafrøði og breiðari samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B. S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir. Verður starvið sett sum adjunktstarv, skal umsøkjarin vera ávegis í eini granskaraútbúgving ella saman við umsóknini senda eitt verkætlanaruppritt um slíka.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta sum skjótast. Umsóknarfreistin er 12. september 2008.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

Umsóknir skulu sendast til:

**Fróðskaparsetur Føroya**

J.C. Svabos gøtu 14 – Postrúm 272 – FO-110 Tórshavn

veitst tú ikki tað?
Sosialurin